# Eivind keypt heilsøluna Anith

**Heilsølan Anith í Havn er nú seld inn á Strendur. Tað er Eivind Jacobsen, fyrrverandi borgarstjóri og nevndarformaður í Strandá Máling, ið hevur keypt heilsøluna, sum hann hevur ætlanir um at byggja út**



*Eivind Jacobsen á Strondum hevur keypt heilsøluna Anith*

**HEILSØLA**

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fyri góðum trimum mánaðum síðan keypti Eivind Jacobsen á Strondum heilsøluna Anith frá Judith og Agnar Petersen í Havn.

Anith selur t.d. hosur, seingjarsett, og undirklæði av ymiskum sløgum til bæði vaksin og børn. Til jólar selja tey eisini leikur o.a.

Sum nú er, selur Anith mest til smærri handlar kring landið, men Eivind Jacobsen sigur, at ætlanin er byggja fyritøkuna út til eina stóra heilsølu, sum selur næstan alt uttan matvørur.

Hann hevur verið á fundi við eina rumenska verksmiðju, sum framleiðir undirklæðir, og góðir møguleikar eru fyri, at hann kann umboða verksmiðjuna í øllum Skandinavia.

Eivind er eisini partaeigari og nevndarformaður í Stranda Máling, har hann eisini arbeiðir, meðan konan, Alina, hevur dagliga raksturin av heilsøluni um hendur.

Eivind Jacobsen sigur, at um onkur heilsøla í landinum er til sølu, hevur tað avgjørt hansara áhuga.


## Nógv spennandi nýtt at síggja á básinum hjá Ergo í ár

**Easy Bike**
Spennandi nýggj súkkla við el-motori sum ger tað nógv lættari at súkkla.

Kom og royn hana á messuni.



**USB Massaga**



Massaguapparat til skrivstovufólkið, set stykkið í telduna og massera har tú hevur brúk fyri tí.

**Dynamo Stólur**
Styrk ryggin við einum Dynamo stóli, frálíkur stólur til nógv endamál.





**Skrivstovustólur við massagu**
Stólurin masserar lendarnar og gevur vibratión til setrið, fótstuðul fylgir við.

**Massagustólur**
So er hann her, Dr. Magic hevur fingið sín yvirmann. Kom á messuna og royn D1 sum eisini masserar armarnar.



**Aero Sleep**
Undirlagið sum ger at tú kanst siga farvæl til hita og sveittatúrar. Eisini gott til astma og inkontinenstrupuleikar.





**Sansarúm**
Fiberoptik við spennandi ljóseffekt, ógvuliga áhugavert í øllum sansarúmum. Gevur góðan visuellan stimuli, og góðar taktilar upplivingar.

J.C. Svabosgøta 8 · FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 · Fax 315 772 ·Fartel. 515 777
Teldupost: ergo@ergo.fo · Heimasíða: www.ergo.fo

Ergo & Hjálpartól
- alt innan hjálpartól -